# Samfelagseindin Føroyar

BOGI ELIASEN
cand.scient.pol





Aftaná at føroyski samfelagsfrymilin brotnaði av um tvøran fyrst í nítiárunum, hava vit sæð nógvar kreppuloysnir og bygnaðarbroytingar. Sumt hevur verið væleydnað og annað ikki. Serliga varð gjørt vart við politisku skipanina, fiskvinnuna og búskaparskipanina. Útinnandi valdið bleiv broytt munandi í bygnaðarbroytingunum hjá Finn Norman Christensen, eitt drúgt álit um at stýrisskipanarviðurskifti skuldi eisini hava við sær betringar til lóggevandi valdið. Rokið um fiski-vinnuna í dag, og at stórur partur gjørdust almennur, siga sítt. Vit hava eitt betri samfelag enn í áttati árunum, men enn manglar nógv.

### Bygdamenning og fiskivinna

Ein spurningur er hvaðar vit vilja í fiskivinnuni. Partar av aling og fiskivinnu eru bygdarmenning bæði í Skotlandi og Noregi, men ber tað til við bert eini høvuðsvinnu? Her er tað at sambandið millum fiskivinnuna og valskipanina er. Hóast fiskivinna er høvuðsvinna okkara, skerts ikki burtur at politiska uppíblandingin og lokalpolitisku valdømisáhugamálini í fiski-vinnuni gera, at fiskivinnan eisini í veruleikanum hevur verið eitt óformligt slag av bygdarmenning ella valdømisvalagni, sum helst eisini er beinleiðis orsøkin, at tað varð so trupult at einskilja Fiskavirking. Politiska ávirkanin hevur tí beinleiðis verið brúkt sum eitt amboð at tryggja arbeiðspláss í egnum valdømi.

### Frágreiðing

Longu í 1994 var ráðstevna í Føroyum um Nordisk Fiskerisamfund i Fremtiden, og árið eftir vóru fleiri av fyrilestrunum givnir út í bók, sum er ummæld í Sosialinum 1. september 1995. Longu har verður av fleiri gjørt vart við, at ein andsøgn er millum gomlu føroysku bygdarmentanina og føroysku tjóðarmentanina. Víst verður á, at tað er neyðugt at broyta hetta fyri at flyta landið frameftir.

### 2006

Vit hava enn somu trupulleikar. Vit hava onga semju um hvussu fiskivinnan skal skipast, hvussu viðurskiftini úteftir skulu verða ella hvussu Føroyar skulu verða. Vit síggja eina parlamentariska skipan, sum brúkar nógva orku til smálutir og smámál. Um støðan við fiskiloyvunum er røtt ella skeiv er eitt, men tað vit síggja er eina skipan, sum sigur seg verða ímóti tí sum gjørt verður, men heldur ikki klárar at semjast um eina broyting. Vilja vit í størri mun hava landspolitikk í Løgtingið, er eisini neyðugt at tinglimirnir umboða alt landið, eins og at tað er alneyðugt at geva tinglimunum nógv betri arbeiðsumstøður m.a. við skrivarum. Vit hava brúkt nógva orku at samanbyggja Føroyar. Enn restar í, men 85 % av fólkinum kann nú koyra í sama vegakervi, og tað er ein onnur støða, enn tá valdømini blivur gjørd. Harafturat hevur kommunusamanleggingin langt síðan yvirhálað valdømini.

### Politiskan vilja

Tað krevur poltiskan vilja at fáa bæði vinnupolitikkin og fiskivinnuna betraða. Spurningurin um Føroyar nakrantíð eru farnar frá sterka bygdarsamfelagnum til Samfelagseindina Føroyar, sum ráðstevnan fyri 12 árum síðani vísti á var neyðugur. Tí er spurningurin eisini, um ikki tað er best at hava eittans valdømi

## Ein skattafrí skipasøla

**Júst frítøkan fyri skatt gjørdi, at eigararnir gjørdu av at selja Gáshøvda og fiskirættindini.**

Skipahandil
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í síðstu viku keypti partafelagið Húsadalur í Sørvági trolbátin Gáshøvda av Viðareiði. Tað bleiv gjørt á tann hátt, at P/F Húsadalur keypti partabrøvini í partafelagnum Kneysi, sum eigur bátin.

Við øðrum orðum keyptu sørvingar felagið við ogn, skuld og fiskirættindum, og teimum nýtist tí ikki at venda sær til fiskimálastýrið viðvíkjandi rættindunum.

Kári Kallsberg, fráfarandi stjóri í P/F Kneysi, sigur, at sambært roknskapinum fyri 2005 er skuldin í felagnum 10,5 mió. krónur. Eginpeningurin var góðar 800.000 krónur. Men hann vil ikki siga, hvat hann og hinir báðir eigararnir fingu fyri felagið. Tað hava teir avtalað við keyparan, men Dimmalætting visti í gjár at siga, at prísurin liggur um 20 mió. krónur. Er tað rætt, hava eigararnir fingið smáar 10 mió. krónur burtur úr søluni.

Kári Kallsberg ásannar, at við at selja partabrøvini í felagnum sleppa seljararnir undan at gjalda skatt av søluni. Partafelagið Kneysur er stovnað í 1988, og tá Kári Kallsberg og hinir báðir eigararnir hava átt felagið síðani 1994, sleppa teir undan at gjalda skatt av søluni. Og tað hevði avgerandi týdning, sigur hann.

- Var sølan ikki skattafrí, høvdu vit ikki selt, sigur Kári Kallsberg.

Annars kom Gáshøvdi til Sørvágs seinnapartin. Skipari verður Heðin Hansen, sum fyrr førdi Vesturvón. Nýggi eigarin, Ólavur Petersen, sigur, at báturin fær annað navn um stutta tíð.



## Til Sofus

Tey skyggjandi, blídligu, blaktrandi ljós
undir hválvinum, minna meg á,
at eg vist ongantíð hevði ta kós,
lagt um áirnar, handanligt brá.

Men er mær tá givin ein gáva sum orð,
og teims endurljóms skapandi mátt:
Tá dynjandi skulu um háreistu skor,
teljast kvøður, ið ynskja tær gott.

Christian Fróði

## Eyðun Nolsøe spælir í Fuglafirði

**Eyðun Nolsøe og hansara menn fara leygarkvøldið at undirhalda í Fuglafirði. Á skránni verða allir teir mongu kendu sangirnir, sum Eyðun hevur verið við til at skriva og spæla inn**

**KONSERT**

Eyðun Nolsøe er ikki hvør sum helst í føroyskum tónleiki. Sum blaðungur gittarspælari og sangari kom hann við í bólkin Frændur, har tveir av eldru beiggjunum eisini spældu við, og longu í 1984 hoyrdist røddin hjá Eyðuni aftur á fyrstu útgávuni hjá Frændum.

Seinni steig Eyðun av álvara inn í ljósið sum sangari og sangskrivari hjá Frændum, og millum sangirnar, ið hann hevur avrikið, eru Á um vit, 80'ini, Mitt land, Brot og vandasker og nógvir aðrir.

Seinni gav Eyðun Nolsøe solofløgu út, og hann hevur eisini givið tónleik út saman við Terja Rasmussen.

Eyðun Nolsøe fer leygarkvøldið at spæla sínar kendu sangir við einum væl mannaðum og væl spælandi bólki, har nakrir av bestu føroysku popptónleikarunum spæla við.

Bussar koyra í sambandi við tiltakið leygarkvøldið.

